## Hoon fekk sekkin

Fyrrverandi bretski verjumálaráðharrin Geoff Hoon er koyrdur úr einari serligari nevnd, sum skal leggja ætlanir fyri virksemið hjá NATO í framtíðini. Tað er aðalskrivarin í samgonguni, Anders Fogh Rasmussen, sum hevur givið Hoon sekkin. Orsøkin er, at Geoff Hoon er koyrdur úr tingbólkinum hjá bretska arbeiðaraflokkinum, tí tað er komið fram, at hann var sinnaður at reka sokallað lobby-virksemi, um hann fekk nóg mikið av pengum afturfyri. Geoff Hoon var bretskur verjumálaráðharri frá 1999 til 2005.



## Styðja nýskipan

Fyri stuttum vóru teir flestu amerikanararnir ímóti teirri nógv umrøddu heilsunýskipanini hjá Barack Obama, forseta, men nú nýskipanin er samtykt, taka tey flestu undir við henni kortini. Ein meiningakanning hjá blaðnum USA Today vísir, at 49 prosent eru fegin um ta nýggju heilsutrygdina, og at 40 prosent eru ímóti henni. Til fyri stuttum vístu meiningakanningar tað øvugta. Politiskir eygleiðarar siga, at broytingin kann fáa jaligan týdning fyri demokratarnar á miðvalinum, sum verður í heyst.

# Motivera arbeiðsleys

**ALS er farið undir at skipa fyri skeiðum fyri at motivera ung arbeiðsleys. Rodmundur Nielsen, vinnulívsmaður, er partur av einum toymi, hvørs endamál er at fyrireika ung til eitt aktivt arbeiðslív**

MOTIVERING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Rodmundur Nielsen umboðar arbeiðsgevararnar á heildagsskeiðunum fyri ung, sum AL skipar fyri*

- At tað júst eri eg, sum eri biðin, er meiri tilvildarligt.

Tað sigur Rodmundur Nielsen, vinnulívsmaður, sum er vorðin partur av einum toymi, ið ALS hevur savnað við tí endamáli, at motivera ung arbeiðsleys.

Ein stórur partur av uppgávuni hjá Rodmundi Nielsen er at motivera tey ungu.

- Tað er ikki ein sjálvfylgja at hava eitt arbeiði. Tað ræður um at vísa, hvør tú ert, tá tú ert til arbeiðis, og gjøgnum tíggju ár hjá Statoil, har vit í stóran mun hava arbeitt við ungum, eri eg vorðin varðigur við týdningin av, at hava ung starvsfólk í arbeiði, sigur Rodmundur Nielsen.

Tað ræður um at eggja ungfólki til at vísa góðan hugburð, tá tey eru til arbeiðis.

- Tað ávirkar jú ikki bert tey sjálvi, um tey missa arbeiðið, men eisini tey, ið eru uttan um tey, sigur Rodmundur Nielsen.

Tað veri seg foreldur ella sambúgvar, tí hugburðurin hjá fólki er vanliga, at tey trívast best, tá tey hava nakað at taka sær til og nakað, at fara upp til um morgunin.

- Í mínum starvi sum vinnulívsmaður havi eg tikið nógvar lærlingar inn, og tað havi eg verið stak væl nøgdr við. Og hjá teimum ungu ræður jú um at vísa, hvat tey duga til, tá tey eru til arbeiðis, sigur Rodmundur Nielsen.

Fyribils hevur hann bert verið til hitt eina skeiðið, men ætlanin er at hava fleiri slík.

- Tað var ógvuliga áhugavert. Nú eri eg sjálvandi bert ein lítil partur av tí samlaða skeiðinum, og talan er um eina heila dagsskrá, men tað var rættiliga spennandi at vera við til eitt slíkt skeið, sigur Rodmundur Nielsen.

### Fyrireika tey ungu

Endamálið við hesum skeiðunum er, at motivera og at fyrireika tey ungu til arbeiðslívið.

- Hugskotið, at hava ein vinnulívsmann við á hesum skeiðunum er, at fáa ein annan vinkul inn í myndina og ikki bert at síggja tingini frá vinklinum hjá teimum arbeiðsleysu. Komið verður eitt nú inn á setanartreytir og annað tílíkt, sigur Rodmundur Nielsen.

Tað eru truplar tíðir á arbeiðsmarknaðinum í løtuni, men tíðirnar broyta einaferð, og tá ræður um hjá teimum ungu at verða til reiðar at taka ímóti avbjóðingunum.

- Motivatión er høvuðsinnihaldið, men eg eri eisini við á hesum skeiðunum fyri at kunna tey ungu eitt sindur um, hvat ein arbeiðsgevari væntar sær av sínum starvsfólkum, sigur Rodmundur Nielsen.

Sum kunnugt er ikki endalig støða tikin, men tað er alt ið bendir á, at hesi heildagsskeiðini fara at halda fram.

# Halda fram við hesum slagnum av skeiðum

**– Í løtuni verður fyrsta skeiðið eftirmett, men tað er einki í løtuni sum bendir á, at vit ikki fara at halda fram við skeiðum av hesum slag, sigur Ernst Jacobsen, stjóri á ALS**

MOTIVERING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Stjórin á ALS, Ernst Jacobsen, er í fyrsta umfari væl nøgdur við hesi dagskeiðini, sum stovnurin er farin undir fyri at motivera tey ungu arbeiðsleysu.

- Hetta fyrsta skeiðið verður í løtuni eftirmett, og tá tann eftirmetingin er liðug, og vit vita, um og hvat vit skulu broyta, verður hildið fram við hesum sløgunum av skeiði fyri tey ungu, sigur Ernst Jacobsen.

Hann sigur, at tað altíð er eitt sindur misjavnt, hvussu tikið verður ímóti slíkum skeiðum, men í hesum føri eins og í flestum øðrum, hava tey flestu tikið væl ímóti.

- Vit hava hildið nógv ymisk skeið, serliga síðani vit fluttu inn í hølini á Tinghúsvegnum. Vit hava hildið telduskeið, málskeið, bókhaldsskeið og skeið í at søkja arbeiði, men tað hevur víst seg, at tey ungu hava ikki verið serliga røsk at melda til slík skeið. Hesi skeiðini hava verið sjálvboðin, so tað hevur sjálvandi verið upp til tey ungu sjálvi, um tey hava tikið lut ella ikki, sigur Ernst Jacobsen.

Hagtølini vísa, at ung upp til 29 ára aldur í meðal telja ein lítlan triðing av talinum av arbeiðsleysum, og tí hevur ALS tikið stig til at aktivera hesi ungu við skeiðum við innkalling.

- Hetta var so tað fyrsta av sínum slag, har tey ungu millum 20 og 25 ár vórðu innkallað, og tað merkir, at møta tey ikki uttan lógliga grund, verða tey skerd í útgjaldinum, sigur Ernst Jacobsen.

Talan er um heildagsskeið, og fleiri fólk eru við í coaching og fyrilestrum. Sum sæst her á síðuni er ein royndur vinnulívsmaður inni í myndini, og eisini eru sjónleikarar við fyri at læra tey ungu rolluspæl.

- Síðani vit fingu hølini á Tinghúsvegnum hava vit gjørt nógv við at halda skeið. Fyrst og fremst hava vit roynt at gjørt gagn av betraðu hølisviðurskiftunum, men vit hava eisini skipa fyri skeiðum í samstarvi við eitt nú Íverksetarahúsið í Klaksvík, Synergi og Handilsskúlan, sigur Ernst Jacobsen.

Onnur skeið verða hildin, har tey vanliga verða hildin, til dømis trygdarskeið og annað.

Tað er Bergtóra Høgnadóttir Joensen, ið hevur staðið fyri hesum skeiðinum, og vit fara í blaðnum í morgin at hava samrøðu við hana um, hvussu skeiðini nágreiniliga eru fyriskipað.



*Ernst Jacobsen, stjóri á ALS*